# 25% í avsláttri av barnaansing í Havn

**Nýggja samgongan hevur brotið upp um ermar, og tey hava stungið út í kortið hvat tey ætla sær. Høgt raðfest ímillum ætlanirnar er, at um foreldur hava fleiri børn í barnaansing, fara tey at fáa 25% í avsláttri av bíligara barninum. Hetta kemur í gildi longu komandi ár**

BARNAANSING

*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin*

– Tað er ein púra samd samgonga, ið stendur aftanfyri hesa ætlanina. Hetta fer at gera ein stóran mun hjá barnafamiljum, sum hava tvey ella fleiri børn í ansing, og vit ætla at uppskotið skal koma í gildi skjótast gjørligt, greiðir Elin Lindenskov, býráðslimur frá.



*Nýggja býráðssamgongan í Havn, hevur brotið upp um ermur, og ætlar sær at stuðla barnafamiljum, har tað veriuliga munar. Systkinaavsláttur verður latin av anskinarkostnaðinum. Býráðið fer framyvir at rinda 25% av kostnaðinum av bíligasta barninum í ansing*

– Barnaansingin er løgd út á kommunurnar, og tí er tað økið lætt at arbeiða við. Men eldaøkið liggur framvegis hjá landinum, og tí skulu teir geva játtan til hvørt røktarheim, ið skal byggjast. Men sjálvandi fara vit at gera alt, vit kunna, sigur hon.

Hon vísir á, at nýggja samgongan fer at seta eitt eldraráð at vegleiða og ráðgeva býráðnum á eldraøkinum. Hetta verður eftir ynski og áheitan frá eldru borgarunum í Havnini.

– Vit eru rættiliga avmarkað, tá tað kemur til eldraøkið. Tað, vit fáa gjørt nakað við, eru børnini og barnafamiljurnar, og har er eisini nógv, ið treingist til at gerast. Vit hava ímillum tey dýrastu ansingarplássini í landinum, og tað er uppá sítt pláss, at foreldrini verða stuðlað har tað veruliga munar, sigur Elin at enda.

### 6000 kr árliga

Hon sigur, at tá seinasta fíggjarætlanin varð løgd, hevði andstøðan hetta sama uppskotið, men samgongan var ikki fyri tí tá.

– Tá fall uppskotið við teirri grundgeving, at tey heldur vildu hækka barnafrádráttin við 200 kr. árliga fyri barnið. Men 200 kr um árið ger jú ikki serliga stóran mun, hjá teimum allar flestu foreldrum, staðfestir Elin.

Við hesum avsláttrartilboðnum, kann tað koma at merkja heilar 500 kr um mánaðin ella 6000 kr árliga, alt eftir hvar børnini verða ansað.

– Tá vit til seinastu fíggjarlógarviðger løgdu uppskotið fram, høvdu vit roknað okkum fram til, at hetta fór at kosta kommununi 1,8 milliónir um árið, og hetta fór at merkjast munandi betur á pengapunginm hjá foreldrunum, enn barnafrádrátturin, sigur Elin.

Hon sigur, at samgongan er samd um hetta uppskotið, og at tað kemur í gildi longu í komandi ári.

– Avsláttarskipanin kemur í gildi skjótast gjørligt. Tað verður nokk neyvan beinanvegin í januar, men í 2005 verður tað, tað er heilt sikkurt, staðfestir hon.

Spurd, um so verandi barnafrádráttur fer at fella burtur aftur, svarar hon, at tað væntar hon ikki.

– Eg síggi onga orsøk at fara at pilka við tað aftur. Hatta ger eisini so lítlan mun allíkavæl, at eg vænti, at hasar 200 kr. vera standandi, sigur Elin.

### Eldraøkið

Greitt er, at nýggja samgongan hevur raðfest barnafamiljuna sera høgt.

– Barnafamiljan er heilt avgjørt eitt av okkara týdningarmestu málum. Øll skulu kunna trívast her, eisini tey smáu. Hølistrupulleikarnir eru loystir, men tað merkir ikki, at tað ikki eru aðrir trupulleikar, sum vit kunnu fara í holt við, sigur Elin. – Tað verður eingin slingur í valsinum á hesum økinum, slær hon fast.

Spurd, um ikki børnini hava havt sítt tørn, og um ikki tey eldru áttu at verði raðfest nakað høgri nú, svarar hon, at tað ikki er sum at siga tað.

### Umleið 6000 kr árliga til foreldini

**– Uppskotið hjá samgonguni er fest á samgonguskjalið, og er ein ítøkilig ætlan, ið fer at koma í gildi í 2005.**

**– Talan er um avsláttur til barnafamiljur, ið hava fleiri børn í ansing.**

**– 25% verða latin í avsláttri av tí bíligasta barninum. Hendan kostnað fer kommunan at gjalda.**

**– Avslátturin kann gerast umleið 500 kr um mánaðin, tað er 6000 kr. árliga. Men tað veldst sjálvandi um, hvussu dýr ansingarplássini eru.**

**eys**

# Jólaskipið á Havnina

Nú eru bara 7 dagar eftir til jólaaftan, og jólamenninir nærkast Havnini. Teir hava sent boð eftir jólaskipinum og sagt, at tað skal vera klárt leygardagin at sigla teir seinasta strekkið, so teir klára at vera í Vágs-botni, leygardagin 18. kl. 15.

Jólamenninir gleða seg nógv til aftur at vera í Havn. Teir er at kalla lidnir við allar jólagávurnar, so nú er bara eftir hjá teimum smáu vættr-unum at pakka tær seinastu inn. Tí kunnu teir nú taka sær av løttum nakrar tímar.

### Jólamenn í Vágsbotni

Jólamaðurin, sum tendraði jólatræið í Havn, hevur sagt teimum, hvussu vakurt alt er. Hann hevði eitt einastandandi útsýni frá stigabilinum og sá stjørnurnar og tey reyðu hjørtini og ikki at gloyma øll tey fittu børnini, sum hann heilsaði uppá.

Frá jólamanshellunum uppi á Kirkjubøreyni og úti í Nólsoy síggja teir ikki bara Havnina, men næstan allar Føroyar.

Jólamaðurin hevur bjóðað beiggjunum hjá sær og onkrum systkinabarni við jólaskipinum, so teir eisini fáa heilsað uppá fólkini í Havn, bæði ung og gomul, og munnu vit ikki eisini fara at síggja teir koma oman í býin at lurta eftir øllum tónleikinum, sum verður hvønn dag fram til jóla? Verða teir svangir og tystir, so eru nógv ungfólk í gongugøtuni og selja kakao, gløgg, bollar og vaflur.

### Jólahúsið í Grasagarði

Jólahúsið í Grasagarði er pyntað og gjørt til at hýsa móðum jólamonnum. Tað verður eisini sjónleikur í Grasagarði, so teir fara ikki at keða seg. Mikudagin hava teir lænt nøkur ross, so teir kunnu vitja niðri á Kongabrúnni eisini.

Jú, her er hugnaligt í Havn, og úr miðbýnum fara vit at bjóða øllum vælkomnum. Vit vóna, at tit fáa eina hugnaliga løtu saman við okkum og tíð at steðga á, heilsa uppá vinir og kenningar og kenna jólagleðina og jólafriðin fella yvir okkum.

Gleðilig jól.

**eys**

